Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 2 |
| Tíð: | 04.02.2021 kl. 13.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Bjørghild Djurhuus, næstforkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Marin Rasmussen, limur, og Petur Rouch, skrivari.

**Fundarskrá:**

1. Viðtal við umboð frá umsitingini av heimasíðuni hjá TK
2. Myndatøka
3. Fyrireiking til fund til leiðsluna fyri Tilhaldið
4. Ymist

AD 1 Viðtal við umboð frá umsitingini av heimasíðuni hjá TK

Rólant Dam og Rókur Tummasarson møtti á fundi og greiddi frá um heimasíðuna hjá TK og um vangan hjá Eldraráðnum. Okkara ynski um ein snarveg til okkara vanga kundi gangast á møti, men líka lætt er at "googla" Eldraráðið í Tórshavn, so kom ein beinleiðis inn á vangan *(Eftir fundin royndi eg skipanina og kom beinleiðis inn á vangan).*
Rólant greiddi frá møguleikanum fyri at gerast lutur av ymsum "Tema" á forsíðuni á heimasíðuni hjá TK. Eldraráðið hevur møguleika at gerast partur av tiltøkum, sum høvdu áhuga hjá Eldraráðnum við at senda tekst, myndir, filmar o.s.fr., sum í samráð við Rólant kundi lýsa okkara íkast til evnið/tiltakið. Henda skipanin verður eisini virkin á Facebook.

AD 2 Myndatøka

Myndatakari kom síðani á vitjan og tók myndir. Hóskandi mynd av "Eldraðnum til arbeiðis" verður løgd út á vangan hjá Eldraráðnum.

AD 3 Fyrireiking til fund til leiðsluna fyri Tilhaldið

Fundur við leiðsluna av Tilhaldinum verður komandi týsdag, har vit ætla at viðgera okkara ynski um at nýta Tilhaldið nøkur kvøld um árið til tiltøk til gamans og álvara ætlað eldra ættarliðnum. Eldraráðið kann sjálvt skipa fyri, men ábyrgdarbýtið má fáast uppá pláss.Tiltøkini kunnu byrja til dømis 19:30 um kvøldið og enda um 10-11 tíðina. Ymisk evnið til hesi tiltøk vóru nevnd í seinastu fundarfrágreiðing, men vit hava enn fleiri hugskot.
Húsið er í dag merkt av frástøðu vegna COVID-19, so bert 17 fólk kunnu vera inni í salinum ísenn. men væntandi kemur broyting í korona støðuna.

Yvirskipað heldur Eldraráðið, at Tilhaldið eisini eigur at vera virkið eftir klokkan 4. Sum er, er Tilhaldið stongt um kvøldarnar, og vit eru av tí fatan, at enn fleiri fólk høvdu vitjað húsið, um tað var opið uttanfyri dagtímarnar. Mong eldri eru enn virkin og upptikin í dagtímunum, men ynskja at hava okkurt stað at vitjað til dagdvølju um kvøldið, og her átti Tilhaldið at verið eitt upplagt stað at vitja.

<u>AD 4 Ymiskt</u>

Vit vita ikki úrslitið av fundinum við leiðsluna í Tilhaldinum enn, men á fundinum var nevnt, at ein møguleiki kanska var at skipa fyri tiltøkunum í Posthúskjallaranum. Hetta eiga vit at leggja okkum í geyma.

Í postkassanum (Mailinum) til Eldraráðið liggja hundraðtals postar, sum ikki eru aktuellir longur ella eru ”Spam”. Petur setir seg í samband við KT-deildina hjá TK um at fáa rudda út i postkassanum.

Á komandi fundi 18. februar klokkan 13 í Tilhaldinum er ætlanin at bjóða tiltakslimum við.

Fundur lokin 14:40.